## Røður í bók

Nú ber til at fáa løgmansrøðurnar tey seinastu tíggju árini í bók. Føroya Lógarrit hevur givið út løgmansrøðurnar frá árunum 1996 til 2006 út í einari meiri enn 400 síður stórari bók. Føroya Lógarrit sigur, at røðurnar eru eitt virðismikið keldugrundarlag í kanning og gransking av føroyskum politikki. Savnið er eisini hent hjá politikarum og starvsfólkum innan almennu fyrisitingina, men bæði lærd og leik kunnu fáa gleði av tí.

## Kannast umaftur

Í summar meldaði Heilsufrøðiliga Starvsstovan tilburðin, tá níggju lomb doyðu í Sundshaga í Vágum í kavarokinum 20. og 21. mai. Fútin svaraði, at hann gjørdi einki við málið, tí eftir hansara meting var ikki talan um djórapínslu. Men Heilsufrøðiliga Starvsstovan heldur ikki, at løgreglan kannaði málið nóg væl og hevur tí biðið fútan kanna tað umaftur. Tá svarið kemur, fer stovnurin at umhugsa at leggja málið fyri ríkisadvokatin.

# Bárður er fullkomiliga samdur

BÚSKAPARFRÁGREIÐING

Bárður Nielsen fær ikki verið meiri samdur við Búskaparráðið um, at konjunkturin má tálmast og at búskaparvøksturin neyvan fer at halda áfram. Tí hava teir við fíggjarlógini fyri komandi ár hava roynt at tikið hædd fyri tí eksplosiva vøkstrinum, sigur fíggjarmálaráðharrin.

Bárður Nielsen er fullkomiliga samdur við Búskaparráðið, tá teir siga, at at konjunkturin má tálmast og at búskaparvøksturin neyvan fer at halda áfram.

Bárður Nielsen sigur, at tí er tað eisini, at teir í fíggjarlógini fyri komandi ár, hava roynt at tikið hædd fyri tí eksplosiva vøkstrinum, sum er í løtuni.

Bárður sigur, at vit mugu hava í huga, hvat tað eru fyri íløgur, sum tað almenna hevur gjørt, men sum nú eru minkaðar. Hann nevnir eitt nú Norðoyatunnilin, sum eina útreiðslu uppá tíggjutals milliónir, men sum nú ikki er.

Bárður Nielsen sigur tó ikki, at hann roknar við at vøksturin steðgar komandi.

– Vit hava ein hákonjunktur í løtuni, men tann eksplosivi vøkstur, vit hava merkt, verður ikki tann sami komandi ár. Vøksturin heldur tó ikki uppat, tí vit koma framvegis at merkja ein lítlan vøkstur næsta ár, heldur fíggjarmálaráðharrin.

### Ikki samdur um skattalættan

Bárður Nielsen er samdur við Búskaparráðið um, at konjunkturin má tálmast. Hann er tó ikki samdur við ráðið um, at skattalættin er eitt keðiligt tekin at senda.

– Skattaskipanin í dag er afturúr sigld, og har hevur verið neyðugt við dagføringum, sigur Bárður Nielsen. Hann vísir eisini til tvær útlendskar kanningar, sum stuðla undir hansara sjónarmiðum um, at vit við skattalættanum eru á rættari leið.

Av øðrum atfinningum í frágreiðingini hjá ráðnum stendur, at orsaka av lítla útflutninginum og høga innflutninginum, annað árið á rað hava eitt milliardaundirskot á handilsjavnanum.

– Tað er rætt, men handilsjavnin er ikki altavgerandi, sigur Bárður Nielsen. Hann sær ikki so stórar trupulleikar í stóra innflutninginum, men vísir heldur á, at trupulleikin er at útflutningurin ikki er øktur. Men her er vón fyri betri tíðum, sigur Bárður.

– Tað eru góð útlit fyri einum vøkstri í útflutninginum, og her hugsi eg serliga um alivinnuna, sigur Bárður Nielsen og leggur so aftrat, at hann eisini metir, at innflutningurin fer at minka.

– Vit komu frá nøkrum árum við stagnatión, har fólk hava havt eitt ávíst eftirsleip. Nú hava tíðirnar so verið góðar, og fólk hava gjørt nakrar íløgur meiri enn vanligt, vísir fíggjarmálaráðharrin á og sigur, hesar íløgur fara at hasa av næstu tíðina.

### Útgjaldsskipan ella frádráttur

Ein stórur trupulleiki við



føroyska búskapinum er rentustuðulin, heldur Búskaparráðið. Teir skjóta upp, at hesin verður avtikin ella skerdur, tí tað er greitt, at rentustuðulin kann gerast ein stór útreiðsla fyri landskassan.

Bárður Nielsen er tó ikki samdur í, at rentustuðulin skal avtakast. Hann vísir á, at tú eisini í øðrum londum hevur rentustuðul í form av rentufrádrátti, men munurin har í mun til í Føroyum er, at í Føroyum er talan um eina beinleiðis játtan á fíggjarlógini.

Búskaparráðið sigur, at tíðin er komin til, at avdrátturin annaðhvørt má avtakast ella minkast, og meðan Bárður afturvísir eina avtøku av rentustuðlinum, so kann hann tó ikki blankt afturvísa, at rentustuðulin átti at minka.

## Ongin búskaparpolitikkur er í Føroym

**– Nú skal eg ikki leggja Búskaparráðnum orð í munnin, men eg haldi at frágreiðingin hjá teimum staðfestir, at ongin búskaparpolitikkur er í Føroyum, heldur Høgni Hoydal.**

BÚSKAPARFRÁGREIÐING

Høgni Hoydal fegnast um frágreiðingina Búskaparráðið nú er komið við. Hann heldur, at tað hava verið alt ov fáar atfinningarsamar røddir frammi, í mun til gongdina í føroyska búskapinum, og tí er tað gott at Búskaparráðið nú rópar varskó.

Høgni Hoydal sigur at tað, sum Búskaparráðið vísir á í frágreiðingini, eru fleiri av somu tingum, sum hansara flokkur hevur víst á, og sigur so, at landsstýrið hevur handlað beint ímóti tí.

Høgni Hoydal nevnir skatta- og avgjaldspolitikkin, kommunubúskapin og rentustuðulin sum nøkur dømi.



Hann sigur, at tá teir hava víst á nøkur av hesum somu viðurskiftum, so hevur tað bara verið skýrt andstøðutos ella grenj og tí er tað gott, at Búskaparráðið nú varpar ljós á nógvar trupulleikar við føroyska búskapinum.

– Nú skal eg ikki leggja Búskaparráðnum orð í munnin, men eg haldi at frágreiðingin hjá teimum staðfestir, at ongin búskaparpolitikkur er í Føroyum, heldur Høgni Hoydal.

# Heimsins minsti skattalætti

BÚSKAPARFRÁGREIÐING

Búskaparráðið finst í frágreiðing síni millum annað at skattalættanum, sum nú verður latin. Jóannes Eidesgaard skilir tó ikki heilt, at so nógv hevur verið gjørt burtur úr skattalættanum í seinastuni, sum løgmaður heldur vera heimsins minsti

– Tað gongur væl í løtuni, og tá vísti eg eisini á í røðu mínari á ólavsøku. Um tað so gongur ov skjótt er ein metanarspurningur, og Búskaparráðið heldur eftir øllum at døma, at tað gongur ov skjótt.

Orðini eigur løgmaður,



Jóannes Eidesgaard. Tá vit fingu orðið á hann, hevði hann ikki lisið alla frágreiðingina sum hon var, men bara ein samandrátt av henni.

Men út frá tí, hann hevur lisið, heldur Jóannes Eidesgaard at lítið nýtt er at koma eftir í búskaparfrágreiðingini.

– Nógv av tingunum, ið Búskaparráðið vísir á, hava verið frammi í almenna kjakinum áður. Hetta við at tálma konjunkturin, skattalættinum og rentustuðulinum er lítið nýtt í, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann leggur tó skjótt aftrat, at hann sjálvandi tekur eina slíka frágreiðing í allarstørsta álvara, og sigur at teir eisini fara at viðgera frágreiðingina politiskt.

– Tað er jú styrkin við demokratinum, at vit fáa frágreiðingar á henda hátt, soleiðis at ljós verður varpað á viðurskifti og ymisk sjónarmið koma fram, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Heimsins minsti skattalætti

Eitt av teimum evnunum, ið Búskaparráðið finst at, er nógv umrøddi skattalættin hjá samgonguni. Men hetta skilir løgmaður ikki heilt, og hann heldur at fólk hava hug at gloyma, hvat skattalættin í veruleikanum kostar.

– 163 milliónir krónur hevur onkur roknað seg fram til, at skattalættin kemur at kosta frá 2006 til 2008. Samstundis mugu vit hava í huganum, at inntøkurnar til samhaldsfasta vaksa við 110 milliónum um somu tíð, so í veruleikanum kostar skattalættin okkum bara 53 milliónir krónur. Tær 53 milliónirnar eru yvir tvey ár, so árliga kostar skattalættin bara 26,5 milliónir. Tað má vera heimsins minsti skattalætti, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

### Rentustuðulin má viðgerast

Í frágreiðing sínari leggur Búskaparráðið upp til, at ein loysn má finnast við rentustuðulinum. Annaðhvørt má hann avtakast, ella eisini má hann skerjast.

– Spurningurin um rentustuðulin má takast upp. Greitt er, at hann ikki kann avtakast her og nú, tí fólk hava bundið seg at lánum grundaði á hann. Men rentustuðulin má viðgerast, og tað skal hann gera ótrúliga skynsamt og varliga, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann vísir á, at hann fegnast um at ljós verður varpað á politisk mál á henda hátt, og at sigur at frágreiðingin fer at verða tikin upp til politiska viðgerð.